## Tóku Auschwitz-skeltið

Um vikuskiftið frættist, at tað kenda skeltið við orðunum „Arbeit macht frei“ uttan fyri ta gomlu týningarleguna Auschwitz var horvið. Tað var fríggjamorgunin, at fólk varnaðust, at onkur hevði tikið skelti, men í gjár bleiv fráboðað, at skeltið var komið afturíaftur. Samsvart týsku tíðindastovuni DPA var skeltið í trimum pettum, tá tað varð funnið aftur. Tríggir menn eru tiknir í sambandi við stuldurin og herverkið, men tað er ikki greitt, hví teir tóku skeltið. Hildið verður, at umlei 1,1 millión jødar vórðu fyribeindir í Auschwitz-leguni frá 1941 til 1944.




## Statoil stóra bót

Norsku myndugleikarnir hava givið oljufelagnum Statoil 25 milliónir norskar krónur í bót fyri eina oljudálking á Statfjord A í desember í 2007, og sambært einum talsmanni fer felagið at rinda bótina uttan mótmæli. Dálkingin, sum Statoil fær bót fyri, hendi tann 12. desember í 2007, tá menn vóru í ferð við at ferma olju av pallinum Statfjord A umborð á flutningsskipið Navion Britannia. Leki kom á slanguna við tí úrsliti, at 4.400 rúmmetrar av olju fóru í havið. Hetta er næststørsta oljudálkingin á norska landgrunninum nakrantíð, skrivar NTB.

# Skip skulu ikki kunna stjalast fyri bagatellir



*- Eg vóni, at málið um Skálaberg endar við eini virðiligari loysn, og frameftir verður neyðugt at hava greiðar mannagongdir, um vit skulu finna rætta stevið aftur í samstarvinum við russar. Tað ber ikki til, at russar soleiðis leggja hond á føroysk skip fyri minstu brot – ella fyri brot framd av ósketni, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum*

**- Tað verður trupult at samstarva við russar frameftir, um vit ikki kunnu hava álit á russisku rættarskipanini. At skip verða tikin fyri minstu brot ella kanska orsakað av brotum, sum standast av ósketni og koma út fyri slíkum sum Skálaberg, gongur slett ikki. Soleiðis, sum málið um Skálaberg er handfarið av russum, er líkt til, at reiðarí kunnu missa síni skip og sína tilveru yvirhøvur. Tað kunnu vit slett ikki liva við, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard**

STRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað hevur ikki verið vanligt í samstarvinum millum Føroyar og Rusland at boða frá, hvørji skip fiska tillutaðu kvotuna – bara kvotan ikki er uppfiskað. Hetta hevur heldur ikki verið vanligt í samstarvinum millum eitt nú Føroyar og Ísland og Føroyar og Noreg.

- So leingi, veiðan er innanfyri samlaðu kvotuna, hevur ikki verið vanligt at blandað seg uppí, hvørji skip fiska kvotuna, og í samstarvinum við russar hevur slett ikki verið vanligt at boðað frá yvirhøvur.

Tað sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum rættiliga er ørkymlaður um Skálaberg-málið.

- Vit skilja slett ikki russisku myndugleikarnar í hesum máli, sum vilja leggja hald á skipið.

Nú russar hava sagt seg sinnaðar at samráðast aftur við føroyskar myndugleikar um nýggja fiskiveiðiavtalu og hava ynskt, at føroyingar koma yvir til Moskva hin 29. desember, dugir Jacob Vestergaard ikki at síggja, hvussu samráðingarnar kunnu takast uppaftur, fyrr enn Skálaberg-málið hevur fingið eina virðiliga loysn.

### Rættarskipanin haltar

Landsstýrismaðurin heldur, at tað verður trupult at samstarva við russar frameftir, um vit sum samstarvspartur ikki kunnu hava álit á russisku rættarskipanini.

- At skip verða tikin fyri minstu brot ella kanska orsakað av brotum, sum standast av ósketni og koma út fyri slíkum sum Skálaberg, gongur slett ikki, sigur hann.

Jacob Vestergaard heldur, at soleiðis, sum málið um Skálaberg er handfarið av russum, er líkt til, at reiðarí kunnu missa síni skip og sína tilveru yvirhøvur, tá slíkt hendir.

- Hesum kunnu vit slett ikki liva við, tí slíkt ger seg inn á tilverugrundarlagið hjá einum heilum felag – í hesum fyri hjá JFK- Trol í Klaksvík, leggur landsstýrismaðurin aftrat.

Hann sigur, at málið um Skálaberg bendir á, at skip regulert kunnu verða stjolin fyri bagatellir.

- Í altjóða havrættarskipan er galdandi, at revsing eigur at standa mát við tað brot, sum er framt.

Nú málið um Skálaberg, sum varð tikin í russiskum sjógvi fyri meiri enn fýra vikum síðan, framvegis er óloyst, vísir Jacob Vestergaard á, at eingin kennir útfallið av hesum.

Tá Sosialurin tosaði við landsstýrismannin, var rættarmálið móti Skálabergi byrjað, men hóast málið nú verður viðgjørt á triðja degi, eru eingi útlit til eina virðiliga loysn.

Soleiðis, sum tíðindini úr Murmansk ljóða í morgun, har rætturin hevur hert sínar ákærur, sum – umframt at vera vendar móti skiparanum – nú eisini eru vendar móti reiðarínum JFK-Troli, bendir mangt á, at Danmark vegna Føroyar noyðist til havrættardómstólin í Hamburg við málinum.

Landsstýrismaðurin í uttanríkismálum, Jørgen Niclasen, segði herfyri, at er eingin loysn fingið innan týsdagin, sum er í morgin, verður farið til Hamburg við málinum.

Jacob Vestergaard sigur, at dømir eru um, at havrættardómstólurin í Hamburg hevur havt mál til viðgerðar millum eitt nú russar og japanesarar, har dómstólurin hevur sagt, hvat er rímiligt fyri at fáa skip leys aftur.

- Tá hevur Rusland sum partur av konventiónini verið noytt at boygt seg og er gingið undir tað, sum havrættardómstólurin hevur áset sum hóskandi trygd fyri at fáa skipið leyst aftur, sigur landsstýrismaðurin.

### Mannagongdir

Jacob Vestergaard er sera harmur um ta vend, sum samstarvið millum Føroyar og Rusland hevur fingið, og hann sigur seg vóna, at londini bæði kunnu leggja hetta aftur um seg og finna rætta stevið aftur, sum hann tekur til.

- Í Føroyum hava vit eina vælvirkandi rættarskipan, har sektin svarar til brotið. Skulu vit gera sáttmála við russar og halda fram við góða samstarvinum, mugu vit eisini hava greiðar mannagongdir um, hvussu slík mál skulu loysast, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.

# Russiska ákæruvaldið leggur hart út

**- Tað verða eg og danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, sum fara at umrøða, hvørt málið um Skálaberg skal leggjast fyri havrættardómstólin í Hamburg týsdagin, soleiðis sum áður ætlað, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanríkismálum**

STRÍÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um Skálaberg-málið verður lagt fyri havrættardómstólin í Hamburg, verður tað í prinsippinum danski staturin sum saksøkir.

Soleiðis verða tað Jørgen Niclasen, føroyskur uttanríkisráðharri og danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, sum í fyrsta lagi fara at taka politisku avgerðina um thetta mál,

- Í endanum av síðstu viku varð brævsent russiska uttanríkisráðharranum um ætlaninar at fara til dómstólin í Hamburg, men hesin heitti í aftursvari á okkum um at lata vera og at lata málið ganga sína gongd.

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í uttanríkismálum, sigur, at málið um Skálaberg fekk eina undarliga vend, tá russiska ákæruvaldið í endanum av seinastu viku heitti á dómaran um at taka eitt mál um ein russiskan trolara, sum liggur í Kollafirði, við upp í málið um Skálaberg.

- Dómarin játtaði at góðkenna hetta skjal sum part av málinum, og hetta er rættiliga undrunarvert, tí málið um russiska trolaran í Kollafirði hevur einki sum helst við JFK-Trol ella málið um Skálaberg at gera.

Jørgen Niclasen vísir á, at soleiðis, sum russiska ákæruvaldið nú hevur lagt Skálaberg-málið fram, vil ákæruvaldið hava ein dóm, sum svarar til einar 20-30 miljónir krónur umframt virðið av skipinum, sum helst er einar 200 miljónir krónur.

- Hetta er heilt burturvið, og eg havi sagt áður, at hetta er vorðið álvarsamasta mál í føroyskari fiskivinnusøgu, sigur landsstýrismaðurin í uttanríkismálum.